# Kunngerðablaðið A

2025

Givið út 23. oktober 2025

Nr. 160

21. oktobur 2025

**Kunngerð**
**um**
**at veita kreditt fyri egingjaldið til heilivág**

Við heimild í § 13, stk. 1 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið verður ásett:

**§ 1.** Í hesi kunngerð er at skilja við:

1) Tilskotsheimilaður heilivágur: Heilivágur, sum tilskot verður veitt til sambært § 13 í heilsutrygdarlógini.
2) Egingjald: Tann parturin av heilivágsútreiðslunum, sum tilskot ikki verður veitt til, sambært § 18 í heilsutrygdarlógini.
3) Egingjaldsmark: Hægsta mark fyri, hvussu nógv heilivágsbrúkari sjálvur rindar sambært § 18 í heilsutrygdarlógini.
4) Kredittskipan: Ein avtala millum Apoteksverkið og heilivágsbrúkara um at veita kreditt fyri egingjaldið í sambandi við keyp av tilskotsheimilaðum heilivági.

**§ 2.** Egingjaldsmarkið verður býtt í 12 eins stórar partar í kredittskipanini, sum svarar til eitt javnt býti av egingjaldsmarkinum yvir alt tilskotsárið.

**§ 3.** Heilivágsbrúkari skal lúka hesi krøv í sambandi við eina avtalu um kredittskipan við Apoteksverkið:

1) Heilivágsbrúkari skal hava útreiðslur til egingjaldið í sambandi við keyp av tilskotsheimilaðum heilivági.
2) Føst gjaldsavtala skal stovnast við Apoteksverkið.
3) Heilivágsbrúkari skal vera skuldafríur við atliti at Apoteksverkinum.

**§ 4.** Apoteksverkið kann sýta eina umbøn um at gera avtalu um kredittskipan í upp til 3 ár eftir, at heilivágsbrúkari hevur mishildið eina avtalu um kredittskipan við Apoteksverkið 3 ferðir.

**§ 5.** Heilivágsbrúkari kann til eina og hvørja tíð siga upp avtaluna við Apoteksverkið.

**§ 6.** Apoteksverkið ger upp kredittin fyri egingjaldið í sambandi við keyp av tilskotsheimilaðum heilivági og inngjøldini hjá heilivágsbrúkara við endanum av hvørjum tilskotsári ella í sambandi við, at heilivágsbrúkari sigur upp avtaluna við Apoteksverkið, sbr. § 5, og sendir heilivágsbrúkara uppgerðina.

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. november 2025.

Heilsumálaráðið, 21. oktobur 2025

**Súsanna Bertholdsen (sign.)**
landsstýrisfólk

/ Bjørgfríð Ludvig (sign.)